eisini hjálpa øðrum at læra okkurt, tí tað er tað týdningarmiklasta í lívinum. – Tað vil eg eisini, segði ein annar og áðrenn samrøðan var av, høvdu allir hinir dreingirnir eisini gjørt av, at teir sjálvandi vildu vera lærarar.

**25. juli**
- Vit hava nú skilt týdningin av skúlagongd, segði fulanileiðarin, tá ið hann varð spurdur um, hvussu hann sá upp á skúlan. Skúlin hevur bæði givið børnunum nógva vitan, umframt at hann hevur styrkt um sambandið millum fulaniararir og hausaririr.

Tað tykist ei heldur sum, at eins stórir munir eru á hausa og fulanibørnunum og tað hevur verið áður – fulanibørnini droyma í øllum førum eisini øll og um at gerast lærarar... Næstan for gott til at vera satt – hvør tímir at vera lærari? ;)

Fyri at síggja eina aðra síðu av Niger, fór eg seinnapartin saman við Jon frá Care til eina lokala heilsuklinikk. Jon var har sjálvur um morgunin, har hann við egnum eygum sá máttloysi í eygunum hjá læknanum, tá ið hann enn eina ferð noyddist at staðfesta, at hann heldur ikki í dag fekk hjálpt øllum teimum stúrandi mammunum og grátandi børnunum. Í 2007 gjørdi nigerska stjórnin í samstarv við Unicef eitt nationalt heilsuprogramm, sum førdi við sær, at man fór at byggja klinikkir kring landið fyri at betra um ringu heilsuumstøðurnar. Hóast hetta hevur gjørt ein stóran mun, manglar enn nógv at verða gjørt fyri at gera ein munagóðan bata – ikki eru nóg nógvir læknar og útbúgvingarstøðið sum heild má verða nógv hægri, um vend skal koma í. Meðan vit sótu og tosaðu við yvirsjúkrarøktarfrøðingin á klinikkini, kom ein pápi knappliga rennandi við lítla soni sínum, sum var sera sjúkur av malaria. Eyguni trillaðu runt í høvdinum á honum uttan at kunna fokusera og samrøðan hjá okkum varð avbrotin eina løtu. Sjúkrarøktarfrøðingurin gav honum eina sproytu og nakrar tablettir og lovaði, at drongurin fór at hava tað nógv betri í morgin – fyri einum ári síðani hevði eitt tílíkt lyfti ikki verið møguligt at givið her.

**26. juli**
Síðsti dagur í Kaima – tað er faktiskt nokkso syrgiligt, at vit nú skulu heim aftur.

Vit hava verið úti í bygdini fyri at siga farvæl við nýggja heim og nýggju afrikanksu vinum okkara. Vit høvdu gávur við okkum til øll tey, vit hava tosað við og eru komin at kenna seinastu dagarnar. Tey vóru øll sera takksom og ein kvinna bjóðaði okkum eina hønu fyri at vísa takksemi sítt.

At læra nakað av einari mentan at kenna, sum er so nógv øðrvísi enn heima, er nakað, man bert sjáldan fær møguleika fyri. Hóast stóra fátækradømi eru øll so gestablíð herniðri. Tað hevur verið so lætt at falla til, at tað virkar ordiliga løgið at skula avstað aftur longu til Maradi.

**28. juli**
Eg haldi, eg eri blivin eitt sindur sjúk... Tað er sum, at vit øll frá OD-sekreteriatinum skulu ígjøgnum eina sjúkraperiodu – vit taka hvør sitt tørn. Fleiri mánaðir eru farnir, síðan heystað var herniðri og tískil eru nógvar bakteriur í matinum – og hetta tola okkara vesturlendsku búkar ikki serliga væl, sær tað út til.

Eg varð illa fyri í gjárkvøldið og varð tí verandi eftir á hotellkamarinum hjá okkum, har streymurin var farin fyri 117. ferð. Battarí'ini í lummalyktini hjá mær blivu brúkt upp í Gabi og eg var tí noydd at liggja einsamøll í myrkrinum alt kvøldið í einari vemmiligari song við einari rúgvu av vemmiligum smáum djórum, meðan eg bíðaði í fleiri tímar eftir, at streymurin skuldi koma aftur. Hóast streymurin fer fleiri ferðir dagliga, eru tey lokalu so von við hetta, at tey ikki irriterast um tað longur. Tvørturímóti er tey takksom fyri at hava streym yvirhøvur.

Tað verður deiligt at sleppa burtur frá hesum vemmiliga hotellinum og koma aftur til Niamey í morgin. – Men at kalla hetta eitt hotell er kanska at gera í so nógv av. Í veruleikanum líkist tað onkrum úr einum vánaligum b-gysarafilmi; hurðarnar kunnu ikki steingjast, so fólk koma vassandi inn um náttina í tíð og ótíð, WC'ini kunnu ikki skola niður, aircondtionin regnar í spannir fleiri staðni, lítil djór koma úr brúsuni – eg kundi blivið við.

**31. juli**
Síðsti dagurin í African land er komin. Eg haldi ikki ordiliga, eg havi skilt, at vit skulu heim enn… Vekk frá tropiska hitanum og aftur til danska regnið – ella; eg hopi, tað regnar í Danmark! Eftir 45 hitastigini herniðri og konstant at stinka av sveitta, hopi eg innarliga, at tað antin regnar – ella enn betri; kavar – í Danmark.

Seinasti fundur okkara var í dag við ein menniskjarættindisbólk, sum Danmark hevur verið við til at seta á stovn. Hóast fundurin var sera áhugaverdur, kendist tað týðiliga á okkum úr OD-bólkinum, at vit nú vóru um at troyttast av fundum eftir at hava verið til sovornar at kalla hvønn dag herniðri í yvir tvær vikur. Tað var ringt at halda fokus og føra eina intelligenta samrøðu, tá ið man eftirhondini at við at detta um av møði.

**28. august**
Nú er tað longu næstan ein mánaði síðani, vit komu heim úr Niger – tað er rættiliga løgið at hugsa um.

Hóast eg upplivdi meira í hesar 16 dagarnar, enn eg nakrantíð havi gjørt áður í lívinum, hevur tað verið ringt at rúma øllum hesum upplivingum sum eina heild.

Í veruleikanum skuldi eg kanska helst enda við at skriva okkurt um, hvussu nógv klókari eg eri blivin upp á heimin og lívið og sett spurnartekin við, hvussu nógv lukkuligari vit í eru í Evropa í okkara modernaðu samfeløgum við allari okkara nýggjastu tøkni. Men eg veit ikki rættiliga nakað um nakað beint nú... Eg veit tó, at tað passar, at eg eri blivin nógv klókari innan nógv øki, eg ikki hevði kunnað lisið meg fram til á studentaskúlanum. Tað er nakað, man ikki kann lesa seg til - tað má upplivast. Upplivingarnar skulu nokk koma upp á pláss við tíðini.

Tað einasta eg veit við vissu beint nú er, at Nigerverkætlanin er feitasta OD-verkætlanin higartil og vónandi verður hetta eisini tann feitastu OD-kampagnan nakrantíð.











